FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir, 27. mars 2012

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 187/2011: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013**

# Uppskot

# til

# samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013 verður 4.721,2 mió. kr. Rakstrarkarmurin er 4.422,6 mió. kr., og løgukarmurin er 298,6 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 4.469,7 mió. kr. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir býttir á greinar.

**Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013**

| *Mió. kr.* | **Rakstur** | **Løgur** |
|---|---|---|
| § 1 Løgtingið | 44,6 | - |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 46,8 | 3,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 289,3 | - |
| § 5 Fiskivinnumál | 149,9 | - |
| § 6 Vinnumál | 292,1 | 24,5 |
| § 7 Mentamál | 930,8 | 107,0 |
| § 11 Heilsumál | 907,7 | 49,8 |
| § 12 Almannamál | 1.656,3 | 46,7 |
| § 15 Innlendismál | 103,1 | 67,6 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | ***4.420,6*** | ***298,6*** |
| **Útreiðslukarmur** | **4.719,2** | |
| § 20 Inntøkur | 4.469,7 | |
| **Inntøkukarmur** | **4.469,7** | |
| **RLÚ-úrslit** | **-249,5** | |

Løgtingið verður gjørt varugt við, at til tess at røkka ætlaða úrslitinum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013 er grundarlagið tær givnu fortreytirnar fyri framskrivingunum og tey neyðugu tiltøkini, soleiðis sum lýst í viðmerkingunum og hjáløgdu Búskaparfrágreiðing I.

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • 165 Argir
Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

**Viðmerkingar**

Sambært § 8, stk. 2 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal ein frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran, leggjast við uppskotinum til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar. Uppskotið til løgtingssamtykt skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Henda skipanin við at læsa fastan játtanarkarmin fyri komandi árið við einari løgtingssamtykt á vári árið fyri hevur nú verið roynd í tvey ár. Hetta er sostatt triðja uppskotið til játtanarkarmar, ið verður lagt fram. Í undanfarnu uppskotunum hevur Løgtingið funnist at, at ov stórur partur av tiltøkunum hevur verið ógreinaður. At tiltøk eru ógreinað merkir, at tey enn ikki eru politiskt samtykt. Atfinningarnar eru tiknar til eftirtektar. Tiltøkini at røkka ásettu kørmunum eru nú ítøkilig og væl útgreinað í Búskaparfrágreiðing I, sum liggur við hesum uppskotinum.

***Fortreytir og krøv til karmin í 2013 og fram til 2017***

Høvuðsfortreytin fyri samlaða játtanarkarmin í 2013 er, at hallið á fíggjarlógini fyri 2013 ikki skal vera størri enn 335 mió. kr. Henda fortreyt varð longu sett av Løgtinginum fyri einum ári síðan, tá Løgtingið eisini samtykti, at fíggjarlógarhallið skal minkast stigvíst soleiðis, at tað verður avlop á fíggjarlógini í 2016. Endamálið við at fáa hallið burtur er at steðga vøkstrinum í landskassaskuldini.

At Løgtingið er samt um, at hallið á fíggjarlógini ikki skal vera størri enn 335 mió. kr. í 2013, merkir, at landsstýrið skal tillaga inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini til hesa fortreyt.

Tað eru tvær rættiliga ymiskar uppgávur at tillaga útreiðslur á einari síðu og inntøkur á hinari síðuni fyri at røkka ætlaða RLÚ-úrslitinum.

Stórur partur av inntøkusíðuni á fíggjarlógini er skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu konjunkturgongdini í samfelagnum. Inntøkusíðan er tí fyri stóran part grundað á óvissar metingar um framtíðar búskaparvøksturin. Útreiðslusíðan er í so máta lættari at meta um, tí størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum almennu Føroyar skulu bjóða.

Tað eru sjálvandi eisini óvissur á útreiðslusíðuni, eins og tað eisini verða framdar raðfestingar og tiltøk á inntøkusíðuni við t.d. reguleringum av skattum og inntøkugrundarlagi, men tað er altíð nógv størri óvissa á inntøkusíðuni. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg serliga um rentugongdina, oljuprísgongdina og úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Við so óvissum fortreytum er tað tí ein stór búskaparpolitisk avbjóðing at stýra eftir einum máli, sum er at fáa avlop aftur á fíggjarlógina í 2016. Tað ber til at gera forsøgnir, sum nøkulunda vísa, hvussu stórur búskaparvøksturin verður í nærmastu framtíð, men eingin er førur fyri at spáa um búskaparvøksturin fleiri ár fram í tíðina. Tí skulu metingarnar av inntøkum landskassans fram til 2017 takast við fyrivarni.

Ein annar trupulleiki er, at tiltøk, sum skulu minka um hallið á fíggjarlógini, virka tálmandi á búskaparvøksturin og tí eisini á inntøkur landskassans. Tiltøk, sum skerja útreiðslur landskassans, ella tiltøk, ið økja skattainntøkurnar, minka eftirspurningin í samfelagsbúskapinum og tí eisini í ein ávísan mun bæði búskaparvøkstur og inntøkur landskassans.

Talvan niðanfyri vísir eina ætlan, hvussu málið at fáa avlop aftur á fíggjarlógina í 2016 kann røkkast. Stýrt verður eftir RLÚ-úrslitinum. RLÚ-hallið á fíggarlógini fyri 2012 er 365 mió. kr., men skal síðan minkast stigvíst, ár fyri ár, til tað aftur er avlop á fíggjarlógini í 2016.

Rakstrarútreiðslurnar og inntøkurnar eru framskrivaðar við 2013-prísum. Hetta merkir, at hædd er ikki tikin fyri prís- og lønarvøkstri. Tó er avgerð tikin um, at í játtanarkørmunum fyri 2013 verður kompensatión ikki givin fyri lønarvøkstur.

Grundarlagið fyri framskrivingini av rakstrarútreiðslunum er, at virksemið verður hildið á júst sama støði sum í dag, tó soleiðis, at hædd er tikin fyri komandi broytingum í t.d. demografisku gongdini innan eldraøkið, dýrkandi heilivági og tali av skúlanæmingum.

Talvan vísir eisini, at um ongar nýggjar raðfestingar verða gjørdar, økjast rakstrarútreiðslurnar kortini 0,9% í miðal árliga nevnda tíðarskeið.

Grundarlagið fyri inntøkuframskrivingini er mettur búskaparvøkstur av Fíggjarmálaráðnum, sum er grundaður á søgulig hagtøl um búskaparvøkstur umframt forsagnir hjá Búskaparráðnum og Landsbankanum.

Fortreytirnar fyri rentuframskrivingunum er metta gongdin í vaksandi landskassaskuldini og útlitunum fyri rentugongdina. Tað er Landsbanki Føroya, sum metir um gongdina í rentuútreiðslum landskassans.

Tað skal viðmerkjast, at eitt tað størsta búskaparpolitiska tiltakið hjá hesi samgonguni fyri at skapa vøkstur í føroyska búskapinum longu er sett í verk við nýggju flatskattaskipanini, sum kom í gildi 1. januar í ár. Við nýggju flatskattaskipanini er marginalskattaprosentið lækkað munandi. Nú loysir tað seg at arbeiða eyka og at fara upp eftir lønarstiganum við at gerast dugnaligari við t.d. at útbúgva seg meira. Flatskattaskipanin fer eisini at eggja føroyingum at flyta heimaftur eftir lokna úbúgving í útlondum.

| **Høvuðsyvirlit yvir RLÚ-úrslit 2012-2017** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
| **Inntøkur, §20:** | | | | | | |
| Inntøkur byrjan | 4.425 | 4.425 | 4.425 | 4.425 | 4.425 | 4.425 |
| Framskrivingar | 0 | -26 | 59 | 129 | 203 | 278 |
| Ætlað tiltøk | 0 | 141 | 141 | 141 | 141 | 141 |
| **Inntøkur tilsamans** | **4.425** | **4.540** | **4.625** | **4.695** | **4.769** | **4.844** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *106* | *108* | *109* |
| **Rakstrarútreiðslur, §1-§15:** | | | | | | |
| Útreiðslur byrjan | -4.436 | -4.436 | -4.436 | -4.436 | -4.436 | -4.436 |
| Framskrivingar | 0 | -58 | -107 | -135 | -168 | -204 |
| Ætlað tiltøk | 0 | 74 | 137 | 175 | 247 | 282 |
| **Rastrarútreiðslur tilsamans** | **-4.436** | **-4.420** | **-4.406** | **-4.396** | **-4.357** | **-4.358** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *99* | *99* | *98* | *98* |
| **Løguútreiðslur, §1-§15** | **-266** | **-299** | **-300** | **-298** | **-296** | **-300** |
| *Indeks* | *100* | *112* | *113* | *112* | *111* | *113* |
| **Rentuútreiðslur netto, §20** | **-88** | **-70** | **-72** | **-84** | **-98** | **-113** |
| *Indeks* | *100* | *80* | *82* | *95* | *111* | *128* |
| **RLÚ-úrslit** | **-365** | **-250** | **-153** | **-83** | **19** | **74** |

### *Høvuðstiltøkini innan játtanarkarmin í 2013*

Føroyska samfelagið hevur stórar búskaparligar avbjóðingar. Tí má stýrast við skili og við fastari hond, so Føroyar koma væl ígjøgnum hesar avbjóðingar, uttan at vælferðin verður sett í vanda.

Samgongan er samd um, at hallið skal minkast, soleiðis at avlop verður aftur á fíggjarlógini í 2016.

Til tess at fáa avlop aftur á fíggjarlógina í 2016 skulu stórar nýskipanir fremjast í almenna bygnaðinum komandi 5 árini. Hetta er galdandi fyri bæði inntøku- og útreiðslusíðu. Harumframt er eisini neyðugt við rationaliseringum og samanleggingum í almenna geiranum. Neyðugt er at fáa sum mest fyri hvørja skattakrónu.

Atfinningarnar frá Løgtinginum seinastu árini, um at ov stórur partur av tiltøkunum í uppskotunum til játtanarkarmar hevur verið ógreinaður, eru tiknar til eftirtektar. Landsstýrið hevur í fyriliggjandi uppskoti til játtanarkarmar útgreinað tiltøk og nýskipanir fyri árini 2013-2017.

Í uppskotinum til játtanarkarmar hevur landsstýrið uppskot um heilsunýskipan og skúlanýskipan. Eisini skal pensjónsnýskipanin setast í verk. Hesar nýskipanir eru neyðugar fyri at framtíðartryggja okkum høgt tænastustøði fyri lægri kostnað. Eisini skal gerast fiskivinnunýskipan, sum gevur vinnuni tryggari og varandi karmar, og sum eisini gevur landsskassanum fleiri inntøkur.

Nakrar raðfestingar eru gjørdar fyri fíggjarárið 2013. Høvuðsraðfestingarnar fara til útbúgvingarøkið og almannaøkið, við fleiri nýggjum røktarheimum og heimum til fólk við serligum tørvi, umframt at rúm er gjørt fyri fleiri næmingum á miðnámi.

Fyri at tryggja virksemið hevur landsstýrið valt at hava hægri løgukarm, sum næstu árini verður 300 milliónir kr. árliga. Hóast valt er framhaldandi at útbyggja infrakervið, fer landsstýrið næstu 4 árini at brúka yvir 60% av løgukarminum til almanna-, heilsu- og skúlaøkið. Hetta er bygging av bygningum, t.v.s. mest virksemisskapandi løgur.

Henda samgongan er sannførd um, at búskaparvøkstur skal tryggja vælferðina í føroyska samfelagnum. Tí var nýggj flatskattaskipan longu sett í gildi 1. januar í ár.

Hóast tamarhald er fingið á landskassahallinum, og vøkstur er staðfestur í búskapinum, so eru enn stór tøk eftir at taka.

**Skjal hjálagt:**
Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I

Fíggjarmálaráðið 27. mars 2012

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Atli Suni Leo